

# Tvær øl í sólini



**Leygardagin kl. 14.33**

Samrøða
Heini í Skorini
heini_skorini@yahoo.com

So var tíð til ein bajara eina løtu. Á vegnum omanfyri spæliplássið og minna pallin situr íslendski journalisturin og føroyavinurin, Jens Guð, og slappar av í sólini. Undir liðini er myndamaður hansara Albert Thorleifsson, og teir eru á G! Festivalinum í arbeiðsørindum fyri Fréttablaðið, størsta íslendska tíðindablaðið.

Jens Guð hevur í mong ár skrivað um føroysk viðurskifti í íslendsku miðlarnar, og hann hevur gjørt sítt til at promovera mong føroysk tónleikanøvn í grannalandinum. Hesaferð er hann komin at ummæla G!, men júst nú hava oyrini fingið nóg mikið, sum hann sjálvur tekur. Hann og myndamaðurin hava fingið fatur á hvør síni 1,5 liturs gulløl eftir eina langa friggjanátt, og teir tykjast at vera í góðum hýri. Spurdur, hvat higartil hevur verið hæddarpunktið fyri hansara viðkomandi, er Jens Guð skjótur at svara.

- Mín favorittur higartil hevur verið 200. Eg havi fylgt teimum frá byrjan, og teir hava ment seg sera nógv. Men Hjálmar var eisini ein stór uppliving í gjárskvøldið, sigur Jens Guð. Hann greiðir frá, at hann og myndamaðurin Albert búgva í einum privathúsum í Syðrugøtu hjá familju hjá Eivør Pálsdóttir, sum teir hava skrivað so nógv um í størsta íslendska tíðindablaðnum.

- Hetta tiltakið er heilt einfalt fantastiskt. Karmarnir við bygdalívinum, sandinum og sjónum skapar ein heilt serligan stemning, og tað er ein fantastisk uppliving at vera við á G!, sigur íslendski tónleikaskribenturin.

Jens Gud metir, at tónlistarliga støðið sum heild hevur verið sera høgt á G!. Hann metir, at G! Festivalurin er á altjóða stigi, bæði hvat tónleiki og samskipan viðvíkur, og sjálvur lovar hann at gera sítt til, at tiltakið skal á breddan í Íslandi.

Men hann hevur tó hug at ilskast inn á fleiri føroyskar tónleikabólkar.

- Tað eru alt ov nógvir, sum syngja sínar sangir á enskum. Eg kann ikki tola, at føroyskir bólkar til føroysk tiltøk bara syngja enskt. Tíðin er farin, tá enskt var obligatoriskt í tónleikaheiminum, slær Jens Guð fast.

Ná, undirritaði fer víðari oman á Spæliplássið at hyggja at útisjónleikinum Ævintýraferðin, men Jens Guð og myndamaðurin vera sitandi við gullbajaranum eina løtu afturat.

# Ævintýr á spæliplássinum

**Leygardag kl.15.09**

REPORTAGA

Heini í Skorini
heini_skorini@yahoo.com

Dánjal á Neystabø hevur alla verðina á sínum herðum, og smáu børnini spíla eyguni út og rópa. Verðin skal niður í eitt glas, sum Hallur Johannesen síðani skal drekka. Børnini hava hug at fara fram at hjálpa til, meðan mammurnar gera sítt ítarsta til at temja sínar ungar og halda teimum sitandi, meðan teir tríggir Dánjal, Hallur og Búi Dam undir útisjónleikinum Ævintýraferðin seta hugflogið í gongd hjá børnum sum vaksnum á spæliplássinum á G!.

Sólin bakar framvegis, og stemningurin er róligur. Tey flestu liggja ella sita á grøna kunstgrasinum, meðan tey allar ivrigastu børnini standa uppi og peika og viðmerkja tað, sum fer fram. Av og á verður friðurin órógvaður av hørðum ljóðroyndum niðri á sandinum, og sambært skránni skuldi tað verið villi heavybólkurin SIC, sum í løtuni hevur ljóðroynd.

Tað sæst á øllum brøgdum, at útisjónleikuin Ævintýraferðin er ein roynd at aktivera barnasinni og interagera við smáu áhoyrararnar, og hetta sær út til at eydnast til fulnar. Men tey vaksnu síggja út til at hugna sær eins nógv og børnini, tí Hallur, Búi og Dánjal duga væl at undirhalda og koma við jøvnum millumbilum við viðmerkingum, sum eisini eru stuttligar fyri tilkomnar sálir. Móti endanum á framførsluni verða børnini biðin um at koma upp á pallin at imitera. Tann fyrsti drongurin hevur nevnar á lofti, og øll rópa við ein munn, at hatta er ein boksari. Fleiri onnur børn nýta síðani høvið at fara fram at imitera.

Ein lítil ljóshærdur drongur sæst tó, sum fegin vil fara fram, men sum ikki tykist hava neyðuga dirvið. 4-5 ára gamli drongurin stendur uppi og hevur hondina hálvgum á lofti, men fer aftur um mammu sína, tá hann endiliga fær møguleikan og verður biðin um at koma fram. So skjótt, næsta barnið fer upp, stendur hann aftur og veipar við ørmunum fyri at gerast tann útvaldi, men hann kendi ikki sína vitjunartíð, og møguleiki hansara tykist vera rokin á hesum sinni.

Til seinast vera øll børnini biðin um at reisa seg og spæla við, og tey kunnu sjálvi sleppa at velja, hvat tey vilja vera. Øll børnini reisa seg manssterk og útfolda síni leiklistarligu evni, meðan Búi, Hallur og Dánjal ganga runt og gita, hvat børnini spæla. Og har eru bæði cowboyarar, svimjarar, rennarar o.s.fr.

Tey vaksnu førka seg longur aftur at seta seg. Nakrar øl skyggja í sólini, og lógvabrestirnir runga, tá teir tríggir entertainararnir eru lidnir. SIC skal í gongd niðri á sandinum, men tað eru fá, sum leggja leiðina oman móti størra pallinum eftir frísælu upplivingina á spæliplássinum. Tey hava betri hug at vera sitandi, til Hjørdis og Genturnar skulu hava sína søguligu framførslu teirra klokkan 16.45.